## DAGSINS MEINING

# Trupulleikar loystir?

Tað er ein stórur spurningur, um Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum loysti teir trupulleikar, sum ætlanin var skuldu loysast á eykaflokstinginum leygardagin. Víst kom formaður floksins styrktur burturúr tinginum. Hann fekk sína viðtøkubroyting, men hon kann ikki nýtast afturvirkandi móti Tórbjørn Jacobsen. Víst fekk formaðurin samtykt eina áheitan á tingbólkin um at heita á løgtingsformannin at bera so í bandi, at Torbjørn Jacobsen kann verða koyrdur úr øllum ting-nevndum, soleiðis at tingfólk loyal móti formanninum kunnu koma inn í staðin. Alt hetta var avgjørt við tryggum meiriluta, sostatt kann formaðurin so langt vera nøgdur.

Men almenningurin er stórt sæð eins klókur og hann var áðrenn flokstingið var sett. Stórir spurningar eru enn ósvaraðir og nýggir spurningar reisa seg eftir. Taka við umrøðuna í útvarpinum og yvirlýsingina, so líktist Tingið meira leikstjórnaðum fundi enn einum flokstingi, ið tók um røturnar á trupulleikunum, tvs. viðger innihaldið í tí skriving, sum fyrrv. næstformaðurin hevur staðið fyri. Hava vit fingið at vita veruliga orsøkina til, at Eysturoyartingmaðurin fór so harðliga út við sínum atfinningum móti formanninum. Hvat var veruliga endamálið? Var hetta tað bera upplop ella lá nakað veruligt aftanfyri! Formaðurin í landsins største flokki varð skuldsettur fyri at manipulera og fyri ikki at vilja lurta eftir øðrum enn sær sjálvum. Hetta vóru álvarsamar atfinningar, ið settu spurnartekin við formansins demokratiska sinnalag og leiðaraevni. Og tað var ikki ein og hvør, sum setti hesar fram. Tað var hansara egni og næsti samstarvsfelagi øll hesi seinastu árini. Mundi Flokstingið viðgera hetta og um ja, hvørja støðu hevði flokstingið til hesar grundleggjandi spurningar?

Eitt fólkatingsval stendur fyri framman. Kann tað hugsast, at hetta hevur lagt lok á og fer at leggja lok á trupulleikarnar? At tað fer at skapa frið í tingbólkinum, soleiðis at meira ikki hendir og Tobbi kann halda fram sum um einki var hent! Fyri Tjóðveldisflokkin hevur hetta val sera stóran týdning. Fólkatingið er einasti politiski plattformur av týdningi uttan fyri løgtingið, sum formaðurin hevur eftir. Var tað tí veruliga so, at tað ráddi um ikki at taka ov drastisk stig, sum kundu styggja Tobba frá at stilla upp til fólkatingsval og har við spilla spælið hjá formanninum? Um hetta var ætlanin, má sigast, at hesin taktikkurin hevur virkað. Tað eydnaðist t.d. at bera so í bandi, at formaðurin ikki misti andlit. Samtíðis varð heitt á tingbólkin um at koyra Tobba úr nevndunum. Men við tað at tingbólkurin er suverenur, so nýtist hann ikki at gera eftir ráðunum. Sostatt kunnu báðir partar vera nøgdir við úrslitið av flokstinginum og tað kunnu teir ivaleyst halda fram við, soleingi lokið ikki fer av pottinum. Tað kundi altíð hent, tí sum nevnt eru tær grundleggjandi ósemjurnar ikki burtur fyri tí, um tær eru komnar undir lok. Vit minnast eisini orðini hjá Tobba um granatirnar, sum hann hevur liggjandi. Hvussu skuldi tað nú skiljast. Eru tað viðurskifti, sum ikki tola dagsins ljós ella? Er tað av ótta fyri at hesar skulu bresta, at Tobbi verður verandi í sínum nevndarsessum? Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fundarsamtykt

**Fundarsamtykt frá aðalfundi Unga Sjálvstýrisins 16. desember 2004**

1. Unga Sjálvstýrið heitir á Føroya Løgting um at skipa fyri orðaskifti um valskipanina. Verandi valskipan gevur ikki røttu umboðanina í Løgtinginum í mun til atkvøðutalið hjá flokkunum. Trupulleikin kemur til sjóndar við jøvnum millumbilum, men einki verður gjørt fyri at loysa hann.

Unga Sjálvstýrið mælir tískil til, at valskipanin verður endurskoðað fyri at tryggja rættvísari býti av tinglimum. Og við atliti til stóru broytingarnar á samferðsluøkinum, eigur at verða umhugsað at lække talið á valdømum.

2. Unga Sjálvstýrið átalar at samgongan við lovaða skattalættanum økir undirskotið á fíggjarlógini fyri komandi ár við 60 milliónum krónum. Hesar 60 milliónirnar høvdu gjørt nógv gagn í samfelagnum, í staðin at verða brúktar til ein skattalætta uttan mál og mið.

Eisini fegnast Unga Sjálvstýrið um at gongd er komið á arbeiðið við Agenda-21 og at bæði kommunalpolitikarar og miðnámsskúlar eru við til at fremja ta hugburðsbroyting, sum skal til hjá tí einstaka borgaranum, til tess at vit kunnu menna land okkara á burðardyggan hátt.

**Nevndin**

Nevndin skipaði seg við Jógvani Skorheim sum formanni, Dan Lamhauge sum næstformanni og skrivara og Kristiani Eli Zachariassen sum kassameistara. Tiltakslimur er Kenneth Rasmussen.

# Átrúnaðarliga stríðið í miðlunum

**Petur Sørensen**

Hevði ikki ætlað at blanda meg út í átrúnaðarliga stríðið sum er í útvarpi og almennu bløðunum, men eitt av seinastu lesarabrøvunum hesum viðvíkjandi fer ikki úr huga mínum, og eg finni ikki afturhald, eg meini veruliga at ein viðmerking til viðkomandi kjaki er neyðug.

Sat áhugaður og lurtaði eftir kjakinum (endurgifta og kvinnuprestar) í seinasta »fimmaranum« frá Útvarpi Føroya, við vón um at okkurt vísdómsorð skuldi fella fyri oyra. Men nei – tað var bert at harmast yvir, ið har kom fram. At hoyra hvussu alt tað, ið heilagt er varð drigið niður og hunddálkað av fólki, ið als ikki hevði andaligt skil fyri tí, ið ført verður fram.

Satt nokk, so eru flestu av hesum fólkum væl skúlaði, hetta endurspeglast í nýtsluni av teirra fremmandu orðum – skilji ikki rættuliga hví, vit hava eitt vakurt og væl orða mál. Skal tað vera so, at vanligi føroyingurin situr við fremmanda orðabók fyri sær til slíkar sendingar, fyri at skilja hesi háfloygdu og sjálvuppgjørdu sjónarmið?

Har ljóðaði ein rødd, ið vildi vera við at Bíblian varð skrivað av monnum, fyri menn. Ja, – kann tað sigast betri! – Ája, viðkomandi kundi bert sagt tað, hon veruliga hugsaði – at Bíblian er óálítandi, at hon stutt sagt er ósamfelagslig og ónýtilig í okkara nútíðarhøpi. Men hesa orðing nýtur røddin ikki, tað er ov ógvusligt – eingin trýr tí. Pakkar tað inn í smartar orðingar so eingin skilur nakað, og slíkt er tað, ið lærdar kvinnur og menn gera.

Lat meg fyrst siga: Tit prestar og onnur lærd – tað, ið tit siga, er í veruleikanum ikki virðismiklari enn tað, ið drykkjumaðurin, skøkjan ella barnið sigur. Munurin er bert tann, at tit hava eina støðu í samfelagnum, ið fær fólk til at leggja oyra til tykkara. Tit gera tykkum dælt av stættarstøðu tykkara. Tit kunnu væl samanberast við synir Eli, ið einki løgdu í Harran – og aftrat tí villleiddu teir fólki. Tit áttu tí at vita, at hóast meginparturin av tí tit siga, er skilaleyst, so koma tit tó við hesum skilaleysu orðum tykkara at skapa eina fólkameining og hon er tann, ið verður til signing ella skaða fyri fólkið – latið tí orð tykkara vera fá!

Tað finnast tó enn nøkur fá í hesum landi, ið finna orð Guds – Bíbliuna – at vera ovasta og einasta orð við myndugleika, á hesum eins væl og á øllum øðrum økjum!

Tá ið nú hesi mál av prestum og lærdum verða leidd inn á tað átrúnaðarliga, so er bert rímiligt at spyrja, hvat sigur skriftin um hesar lutir? Harrin Jesus segði: »Eg skal sjálvur byggja samkomu mína…« Til hetta setti Hann í samkomuna apostlar, profetar, evagelistar, hirðar og lærarar, fyri at byggja upp samkomuna, ið Hann vann sær við blóði sínum.

Vit finna hesar apostlar seinni at seta inn elstar og samkomutænarar sambært ráði Guds. Hesir innsettu til tænastu í samkomuni vóru allir royndir menn og fyltir av Guds Anda, hetta til samanbering við teir innsettu nú á døgum, ið eru fyltir við heimsins vísdómi og eginvilja. Hesir, sum í hugmóði sínum finnast at og seta niður á Paulus fyri hansara læru og sjónarmið. Hesin Paulus, ið var útvaldi reiðskapur Guds til at frelsa heidningar við.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.